# Niels Winther aftur í Føroyum

FYRILESTUR
*Tíðindaskriv*

Í sambandi við at tað í ár eru liðin 150 ár síðan Niels Winther (1822-1892) gav út hitt fyrsta føroyska blaðið ætlað føroyingum - FÆRINGETIDENDE - skipar Landsbókasavnið fyri almennum fyrilestri, har Jákup Thorsteinsson, søgufrøðingur, fer at halda fyrilestur um bókmentamannin og Føroya fyrsta politikara, Niels C. Winther.

Umframt at tað eru liðin 150 ár í ár síðan Niels Winther gav út FÆRINGETIDENDE, so eru sum kunnugt eisini 150 ár liðin, síðan Løgtingið varð endurreist, tað løgting Niels Winther so manniliga bardist fyri at gera so føroyskt sum gjørligt.

Janus Kamban, myndhøggari, gjørdi í tríatiárunum eina høggmynd av Niels Winther. Høggmyndin varð sýnd fram á listaframsýning í Havn á ólavsøku 1936. Um høggmyndina skrivaði William Heinesen m.a. í einum ummæli í Føroya Social Demokrati. nr. 38, 1936:

*"Og so var har ein standmynd av einum røðara, ein klókur álvarsmaður - tann føroyski politikarin og undangongumaðurin Niels Winther. Tað er ein royndur lutur, at Janus Kamban, so ungur hann er, hevur nógvar dygdargávur... Hansara standmynd av Niels Winther er fyrsta størra myndhøggaraverk hansara. Hann er førur at skapa okkum fleiri."*

Høggmyndin er nú stoypt í bronsu og høvi verður aftur hjá almenninginum at síggja listaverkið.

Fyrilesturin hjá Jákupi Thorsteinsson verður á Landsbókasavninum mikukvøldið 18. desember, kl. 20.

# Gospelkórið Vox í Fríðrikskirkjuni



KONSERT
*Tíðindaskriv*

Sunnudagin kl. 16 hevur gospelkórið Vox jólakonsert í Fríðrikskirkjuni á Toftum. Vox er myndað av 24 ungum fólkum úr Heimamissiónini, og kórleiðari er Ásbjørn Berthelsen av Strondum.

Gospelkórið hevur nú tilsamans fimm ár á baki, og hesi árini hevur kórið havt fleiri framførslur serliga í sambandi við ymisk tiltøk hjá Heimamissiónini. Vox syngur rytmiskan gospelsang, sum í samband við jólahátíðina, verður av tí meira friðarliga slagnum.

Á jólakonsertini verða flest føroyskir sangir framførdir, men onkur útlendskur verður innímillum. Umframt tað samlaða kórið verða eisini nakrar framførslur frá einstaklingum í kórinum.

Gospelkórið Vox bjóðar øllum hjartaliga vælkomnum á jólakonsert í Fríðrikskirkjuni á Toftum sunnudagin kl. 16.

# 50. bók av Fróðskaparritum útkomin

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Í ár hevur Føroya Fróðskaparfelag 50 ár á baki, og í sambandi við 50-ára haldið er eisini 50. bók av *Fróðskaparritum* komin út.

Permumyndin hesa ferð vísir ikki til eina av greinunum í bókini, sum annars hevur verið vanligt, men er ein heiður til teir tríggjar av stovnarum felagsins, ið mannaðu nevndina fyrstu 25 árini.

*Fróðskaparrit* royna eftir besta førimuni at fylgja við nýggju tíðini, og frá bók 50 kunnu høvundarnir taka serprent teirra niður um alnótina og senda greinarnar runt knøttin. Samstundis er ein gáva frá Føroya Landsbókasavni til Føroya Fróðskaparfelag á 50-ára degnum talgilding av øllum 50 bókunum, og verður tað arbeiðið ætlandi liðugt summarið 2003.

Føroyski parturin av greinum í *Fróðskaparritum* hevur í hesum 50 bókunum skift úr 17 upp í 100 %, men í miðal verið 66%. Samstundis er tað sera gleðiligt, at eisini so nógv uttan fyri landið arbeiða vísindaliga við føroyskum viðurskiftum. Í bók 50 er føroyska luttøkan júst tveir triðingar.

*Fróðskaparrit* 1-50 hava verið fíggjað av Mentunargrunni Føroya Løgtings (nú Mentanargrunnur landsins), og hevur Maud Heinesen, skrivari í Føroya Fróðskaparfelag síðani 1963, skrivað um søguna aftanfyri og samstarvið við grunnin *(Fróðskaparrit og Mentunargr*unnur Føroya Løgtings).

Danski fornfrøðingurin Steffen Stummann Hansen, ið starvast á Dansk Polar Center, greiðir í greinini *A Dane and the Dawning of Faroese Archaeology* frá um navngitna danska professaran í búlandafrøði, Gudmund Hatt sála, sum á veg heim úr Grønlandi í 1932 hevur grivið í eini fransatoft við Hvítanes. Kona Gudmunds, Emilie Demant Hatt, ið var listamálari, málaði fleiri myndir, meðan hon og maðurin vóru í Føroyum.

Frá Roskilde Universitetscenter (Ruc) vísir Jørgen Ole Bærenholdt á týdningin av tvørtjóða samstarvi í Útnorðri í greinini *The Significance of Transnational Cooperation in Nordic Atlantic Regions.*

Tey seinastu árini hava fleiri granskarar viðgjørt William Heinesen og hansara skaldskap, eisini í *Fróðskaparritum*. Í hesi bók hevur Aage Jørgensen við greinini *William Heinesen* - et Supplement til hans Bibliografi gjørt greinasavnið um og eftir William meira fullfíggjað.

Málfrøðingurin Hjalmar P. Petersen hevur ótroyttandi viðgjørt málið í *Fróðskaparritum*, hesa ferð við greinini *Quirky Case in Faroese,* ið er skrivað, so tað er væl skiljandi eisini fyri granskarar uttan fyri føroyska máløkið.

Tað stóra og tíðarkrevjandi arbeiðið við føroyskum orðabókum hevur nú givið so nógv av sær, at eisini gevst høvi at granska í orðabókum, her við greinini *Orð við fremmandum atskoytum í føroyskum orðabókum,* sum ein av ritstjórunum á Føroyskari orðabók (Móðurmálsorðabókini), Marjun Arge Simonsen, hevur skrivað.

Sum lið í eini PhD-verkætlan innan landalæru hevur Lis Elinborg Mortensen, ið starvast á Jarðfrøðisavninum, millum annað kannað fjallaveðrið. Allar veðurstøðirnar í landinum standa nær sjónum, men her er ein veðurstøð sett upp á Sornfelli í 722 m's hædd. Hanne E. Christiansen og Lis E. Mortensen hava í felag greitt frá hesum í *Arctic Mountain Meteorology at the Sornfelli Mountain in Year 2000 in the Faroe Islands.*

Fleiri føroyingar kunngera teirra høvuðsritgerð í *Fróðskaparritum*, eitt nú Magnus Gaard, lívfrøðingur á Náttúrugripasavninum. Hann hevur við greinini "Myxidium gadi *(Georgévitch, 1916) and* Myxidium oviforme *(Parisi, 1912) in the Gall Bladder of Cod* (Gadus morhua L.)" roynt út frá slagnum av snúltarunum í gallbløðruni hjá toski at staðfesta, hvar toskurin hevur hildið til.

Somuleiðis sum lið í PhD-verkætlanunum hava Erla Olsen and Anna Maria Fosaa, báðar plantufrøðingar á Náttúrugripasavninum, í *The Mycorrhizal Status in Mountainous Vegetation in the Faroe Islands* skrivað um sambandið millum moldsoppar og plantur á fimm fjallasíðum kring landinum.

Ein høvuðsritgerð afturat er prentað í hesum *Fróðskaparriti.* Ámundur Nolsøe á Lærda Háskúlanum í Århus hevur eisini arbeitt við snultarum og nágreiniliga kannað vistfrøðina hjá øllum snúltarunum í lundum. Úrslitini standa í *Ecology of Endoparasites on the Atlantic Puffin* (Fratercula arctica grabae *(Alcidae: Charadriiformes)*.

Lívfrøðingarnir Søren Achim Nielsen á RUC og Boy Overgaard Nielsen á Lærda Háskúlanum í Århus hava funnið eitt nýtt slag av bitmýggi herheima, og greiða teir frá tí í *The Biting Midge* Culicoides impunctatus *Goetghebuer, 1920 (Diptera: Ceratopogonidae) recorded from the Faroes.*

Eins og í *Fróðskaparritum* frammanundan verða tey umrødd, ið hava fingið doktaraheiti, og somuleiðis er yvirlit yvir tað, sum granskarar innan- og uttanlands hava útint av vísindaligum verkum av ymsum handa slag árið 2001 um føroysk viðurskifti.

*Fróðskaparrit* 50. bók er 169 blaðsíður. Haldaragjaldið er 165 kr. um árið, og nýggir haldarar kunnu tekna seg hjá: **Føroya Fróðskaparfelag, handan Á 5, Tórshavn, tel/fax 322074, ella við teldupost: fff@frodskaparfelag.fo**

Í leysasølu kostar ritið 195 kr.

Mentanargrunnur Landsins stendur fyri seinastu ferð sum útgevari, og Bókamiðsølan hevur enn sum áður søluna um hendur.

# Liv sigrandi í Kristusi

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv frá Forlagnum Rhema*




Nýggj bók kemur í hesum døgum út á føroyska marknaðin. Hon eitur "Liv sigrandi í Kristusi". Skrivað hevur Fríðtór Debes. Bókin er 42 blaðsíður og kostar 70 kr. Fæst í flestu bókhandlum í landinum. Hestprent hevur staðið fyri prentingini.

Tað er onki at ivast í, at evnið í hesi bók, ið her verður viðgjørt, er av alstórum týdningi fyri okkum. At vit øll, ið hava gjørt Jesus Kristus til Harra okkara, kunnu liva eitt sigrandi lív í gerandisdegnum, er Nýggja Testamentið besta boð uppá.

Bókin er deild upp í 4 kapittlar, ið allir viðgera ymisk evnir. Hon byrjar við orðunum "vakna, tú, ið svevur" fyri at vakja okkum øll andaliga. Undirtónin er, at nógv kristin byrja væl andaliga og eru brennandi eina tíð, men sum frá líður, kølna tey meira og meira. Í veruleikanum er hesin kapittulin eitt ávaringarróp til okkum øll, um at vakna úr dvala!

Síðani heldur bókin fram við at nevna 3 ting, ið kunnu hjálpa okkum í andaligu gongdini fram eftir.

Sum tað fyrsta, verður dentur lagdur á at geva Orði Guds fyrsta plássið í lívi okkara, og hvønn týdning hetta hevur fyri okkum. Bíblian er bókanna bók og eigur at verða kærasta og dýrabarasta bókin í lívi okkara.

Harnæst verður tosað um týdningin, sum bøn hevur í okkara kristna lívi. Tað er ein rúgva av fólki, ið als ikki biður og er tað í veruleikanum sera løgið, tí bønin í lívi okkara er andadráttur okkara. Uttan andadrátt doyggja vit – júst á sama hátt doyggja vit andaliga um vit ikki biðja!

Fyri tað triðja, so verða vit eggjaði at lata Heilaga Andan leiða okkum dagliga – í øllum lívsins viðurskiftum. Hann er ein spennandi persónur, ið tú og eg eiga at koma at kenna betur. Hann skal leiða okkum inn í allan sannleikan.









